## Eingin jóansøkufestivalur

Festivalurin órógvar hini tiltøkini á jóansøku ov nógv, og tí ynskir Vágs Býráð ikki at stuðla festivalinum. Tað eru boðini, sum jóansøkufestivalurin ber víðari, nú tey kunnu staðfesta, at festivalurin verður av ongum í ár. Talan verður tó bert um fyribils steðg. Kristian Holbæk, sum í fjør var samskipari av festivalinum, sigur, at tey hava merkt fullan stuðul til festivalin frá Tvøroyrar Býráð, og at alt tí bendir á, at festivalurin aftur verður hildin í 2009.



## Kvinnur í Norðurlandahúsinum

Á altjóða kvinnudegi 2008 skipar KvinnufelagaSamskipan Føroya (KSF) saman við Kvinnufelaginum í Havn fyri 8. mars-haldi í Norðurlandahúsinum. Byrjað verður í forhøllini kl. 15.00, har Amnesty hevur framsýning um iranskar kvinnur. Við myndum og teksti fer KvinnufelagaSamskipan Føroya at seta fokus á nakrar av okkara undangongukvinnum. Frá kl. 15.30 til umleið kl. 17.30, verður orðaskifti um fosturtøku, har evni verður lýst frá ymiskum sjónarhornum, bæði fakligum og hugsjónarligum, eitt nú tí juridiska, læknafrøðiliga, kristiliga, tí samfelagsliga og persónliga sjónarmiðnum. Elin Winther Poulsen, tíðindakvinna verður fundarstjóri.

# Nú verður trýst á Summar Festivalin



*Hóast trýstið er økt, nú fleiri av hinum festivalunum fyribils eru steðgaðir, so verður talan ikki um at økja støddina á SummarFestivalinum, sigur Steintór Rasmussen, fyriskipari*

**G Festivalurin, Asfalt og Jóansøkufestivalurin verða ikki hildnir í summar, og tað økir trýstið á Summar Festivalin. Fyrireikararnir ætla tó at halda fast í, at í mesta lagi 8.000 atgongumerki verða seld til festivalin**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Summar Festivalurin verður einasti veruligi tónleikafestivalurin við popp og rocktónleiki, sum verður hildin í summar. G! Festivalurin hevur fyribils lagt stilt, og um dagarnar varð greitt, at Asfalt og Jóansøkufestivalurin heldur ikki verða á skránni í summar. Eingin fráboðan er heldur komin frá Mjús, um tiltakið, sum ikki verða hildið í fjør, verður hildin í ár. Fjarðafestivalurin, sum er ein gospelfestivalur, skal haldast sum vanligt.

- Nú er nærum bara Summar Festivalurin eftir at teimum mongu festivalunum, sum hava verið hildnir, og tað fer ivaleyst at økja trýstið á okkara festival. Nógvir bólkar vilja sleppa á pallin á Summar Festivalinum, og vit rokna eisini við nógvum fólki til festivalin í ár, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum.

### Halda fast um støddina

Summar Festivalurin hevur vaksið seg til største tónleikatiltakið í landinum, og í fjør vóru sløk 10.000 fólk á festivalinum, harav ein fittur partur eru børn, umframt starvsfólk og tónleikarar. Hóast tað nú liggur á Summar Festivalurin at metta eina stóra svanga áhoyrarafjøld , so halda fyrireikararnir ikki, at tað er ráðiligt at vaksa um festivalin.

- Vit halda fast um, at vit selja 8.000 atgongumerki, og hóast vit kunnu rokna við, at áhugin fyri festivalinum í ár kann gerast størri enn árini frammanundan, so kunnu vit ikki loyva nógv fleiri fólkum inn, sigur Steintór Rasmussen og sipar til bæði dygdina og trygdina.

- Hóast vit hava eitt rúmligt og vælegnað øki, so mugu vit fyrst og fremst hugsa um geva tí einstaka gestinum eina góða festivaluppliving. Tað skulu takast nógv fyrilit og ikki minst nú vit vita, hvussu tað føroyska summarið kann taka okkum øll á bóli, bæði so og so.

### Mugu liva við støðuni

Steintór Rasmussen harmast, at tað verða færri stór tónleikatiltøk á skránni í Føroyum í summar.

- Tað er spell, at fleiri av teimum stóru tiltøkunum eru dottin niður fyri, og tað er ikki bara stuttligt, at flest eygu og oyru nú eru vend ímóti Klaksvíkini. Eg vóni at bæði G! og Asfalt koma fyri seg aftur, men fyribils mugu royna at lyfta uppgávuni so væl sum tilber og royna at geva pláss so nógvar tónleikabólkar og gestir, sum vit nú einaferð halda vera ráðiligt.

- Og verður Summarfestivalurin útseldur, so fara vit at liva við tí, sigur Steintór Rasmussen, sum síðani 2004 hevur upplivað eina vaksandi undirtøku fyri Summarfestivalinum.

Umframt tey 8.000 atgongumerki, ið eru sett til sølu, verða atgongumerki eisini latin arbeiðsfólki, tónleikarum og sponsorum, og samanlagt kunnu 10.000 fólk sleppa inn á festivaløkið.

## The Dreams á Vágsbøi

**Stóri pallurin á Vágsbøi skal hýsa brandaktuellu the Dreams. Eisini verða Páll Finnur Páll og Ghost at hoyra í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av heitastu føroysku bólkunum varð í dag settur á plakatina hjá SummarFestivalinum.

The Dreams hava seinnu árini roynt at gjørt vart við seg uttan fyri landoddarnar, og við punk-hittinum, La' mig være, blástu teir at kalla Danmark umkoll, tá teir stóðu á danska Grand Prix-pallinum. At teir ikki vunnu sær møguleikan at fara til Serbia at dystast, hevði minni at siga í so máta. Og sjálvir tóktust teir hálvgum fegnir um, at teir ikki endaðu heilt ovastir. Málið var at seta teirra tónleik á Danmarkarkortið, og tað eydnaðist eisini so ruddiliga.

- Vit eru sera fegin um, at vit eisini kunnu bjóða SummarFestivalin fram sum eitt forum fyri føroyskar bólkar. Ikki minst, tá talan er um bólkar, sum hava gjørt somikið nógv vart við seg, sum the Dreams hava seinastu tíðina, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum av Festivalinum.

- Og vit hava longu gjørt av, at tað verður á stóra pallinum, at Dreams fara at spæla. Teir hava fyrr spælt í stóra tjaldinum, og tað skuldu teir ætlandi eisini í fjør, tá veðrið tó steðgaði teimum ætlanunum. Men vit kunnu longu nú staðfesta, at ein slíkur bólkur rúgvar somikið nógv, at tað verður á stóra pallinum, at framførslan verður, sigur Steintór.

### Páll Finnur Páll og Ghost

Umframt the Dreams, so vóru vóru eisini tvey onnur føroysk nøvn kunngjørd í morgun.

Páll Finnur Páll hava mest sum fingið kultstatus, síðani teir fyri nøkrum árum síðani brutu føroyska ljóðmúrin við forelskaða sjónleikaranum, og eingin ivi er um, at fjøldin fer at syngja við, tá teir trína á pallin á festivalinum.

Og við nýggja teknotónleikinum hjá Ghost fær festivalurin eisini enn eina tónleikadimensjón. Ghost hava vunnið seg nógv fram hjá føroysku lurtarunum seinastu tíðina, og talan tykist her vera um enn eitt spennandi førosykt navn, sum við fullari ferð klintrar uppeftir føroyska tónleikapallinum.



*Tað verður punk og harður tónleikur fyri allar pengarnar, tá the Dreams fara á stóra pallin á SummarFestivalinum*